# ða tjóðskaparlig semja!



*EFTA aðalskrivarin Wilima Rossier, var við á einum evnisfundi.*





*Kunnu hesir semjast um at arbeiða framímóti einum sjálvberandi føroyskum búskapi.*








*2015 skal verða ein tjóðskaparlig semja við so breiðari politiskari undirtøku sum gjørligt*

fáa, og tí heldur ikki amboð til at meta um hvar tørvur er á fólki og hvørjum útbúgvingum leggjast skal dentur á at fáa fólk at taka. Skulu vit hava gransking og nýmenning bygda á føroyskan førleika, er hetta vælsagtans ein fyritreyt.

## Brúka tøknina

Føroyar eru soleiðis háttaðar, at kunningar og samskiftistøknin ger at vit ikki eru so fjarskotin longur, eins og tað kann brúkast sum eitt amboð til at binda Føroyar nógv tættari saman, og er hetta uttan iva ein neyðugur hornasteinur. Góðir karmar fyri íverksetarar eru eisini neyðugir fyri at hava eitt innovativt og dynamiskt vinnulív, eins og eingin ivi er um at einskiljingar eru neyðugar.

## Arbeiðsmarknaðurin?

Havandi núverandi støðuna í huga tykist tað tó løgið, at størri dentur ikki verður lagdur á arbeiðmarknaðarviðurskifti. Fyri ikki so langari tíð síðan var streymurin sløktur og har mátti politiskt leggjast uppí. Nú hevur júst verið orrusta við Starvsmannafelagið, sum ikki fekk eina loysn fyrr enn tað lá í kortunum at lagt bleiv uppí politiskt, og samstundis er vandin fyri at fleiri arbeiðsteðgir koma komandi tíðina heilt vist til staðar, og hetta er ein afturvendandi støða. At menna Føroyar til at verða ein vinnari í alheimsgerðini, hevur eisini við sær at fáa nógv betri, tryggari og meira skipaði viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum. Men eisini at arbeiðstakarin kemur í eina tilgongd, har hann umvegis eftirútbúgvingar og umskúlingar verður fyrireikaður til ta broyting føroyska samfelagið skal ígjøgnum, um landið skal verða eitt av heimsins bestu at búgva í um 10 ár. Evni hevur tó verið umrøtt á evnisfundi um 2015.

## Raðfesting

Tað nyttar einki at seta sær fyri at verða fremst á øllum økjum. Tað skal raðfestast og veljast kjarnuøki sum metast skal um, um hesi kunnu tryggja at Føroyar gerast eitt av fremstu londunum. Landsstýrið hevur her meldað út hornasteinarnar. Og sum sagt í byrjanini, verða altíð ymiskar fatanir um hetta er rætta raðfestingin. Nú verður so arbeitt við hvørji málini eru á hesum økjum, sum skulu verða nádd í 2015 og hvussu tey skulu røkkast.

## Sjálvberandi búskapur

Ein spurningur sum hevur verið frammi í fjølmiðlunum, er eisini spurningur um ein sjálvberandi føroyskan búskap og har hevur Løgmaður sagt, at hesin spurningur ikki er avgreiddur enn. Sum skilst eru enn fundir við partar av samfelagnum. Málið um sjálvberandi búskap má neyðturviliga eisini verða ein spurningur um at avtaka heildarveitingina úr Danmark, og hesum spurningi er neyvan semja um í samgonguni.

## EFTA

Á fundarskránni, sum Landsstýrið hevur havt, sæst at undir evninum "viðurskifti okkara við ES", luttók eisini aðalskrivarin í EFTA, og hetta hevur kanska verið við til at sett í gongd arbeiði við ynskinum um tættari samstarv við EFTA, sum hevur verið nógv frammi í summar.

## Tjóðskaparlig semja

Tað verður spennandi at síggja endaligu visjón 2015 við raðfestingum og ætlanum um hvussu málini skulu røkkast. Talan er um eitt gott og alneyðug tiltak, men enn er torført at gera metingar um arbeiðið. Kritikkurin er tó , at andstøðan ikki er tikin nóg nógv við í arbeiðið, tí tað er alneyðugt at talan er um eina breiða politiska semju, tjóðskaprliga semju, sum ikki verður tveitt fyri borð tá stjórnarskifti er. Hinvegin so skrivar Løgmaður, at áðrenn ein strategi skal leggjast er neyðugt at hava evnisdagar um viðurskiftini, og haðani skal so ein virkisætlan gerast, sum skal verða eitt manifest og ískoyti til samgonguskjalið. Tað er eisini neyðugt fyri at koma í gongd við arbeiðnum. Men tá talan er um eina langtíðarætlan um hvar Føroyar skulu verða um 10 ár, skal tað verða fest í meira enn bara samgonguskjalið. Her má málið verða at gera poltiskar avtalur millum so stóran part av flokkunum sum gjørligt.

Samanumtikið er hetta eitt sera gott og týdningarmikið tiltak og fara vit her á Tinghelluni komandi vikurnar at hyggja at einstøku pørtunum av ætlanini 2015.